Vandi fyri at Tórshavnar Kommuna verður boykottað

–Fær Tórshavnar Kommuna ikki viðurskiftini í rættlag, er vandi fyri at tiltøk verða sett í verk og at alt arbeiði, sum kommunan hevur í Kollafirði, verður niðurlagt

ÓSEMJA
Áki Bertholdsen

Tað er ikki longri síðani í fjør, at verkfall var í Kollfirði. Tá var ein avleiðing, at skúlin mátti lataaftur so at øll skúlagongd varð niðurløgd. Nú er ikki langt frá, at tað hendir einaferð afturat

Nú er aftur vandi fyri verkfallið í Kollafirði.

Bæði Føroya Arbeiðarafelag og Kollafjarðar Arbeiðarafelag gera púra greitt, at fáast viðurskiftini hjá kollfirðingum ikki í rættlag, verða tiltøk sett í verk ímóti Tórshavnar Kommunu.

Sum sæst á grein aðrastaðni í blaðnum, er stór ósemja um viðurskiftini hjá teimum limum í Kollafjarðar Arbeiðarafelag, sum arbeiða hjá Tórshavnar Kommunu. Eitt nú hevur Tórshavnar Býráð tikið sær rætt til at flyta limagjald, eftirlønargjald og lívstrygging til onnur feløg enn Kollafjarðar Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

Ingeborg Vinther sigur, at Føroya Arbeiðarafelag hevur ferð eftir ferð roynt at fingið Tórshavnar Kommunu at fáa viðurskiftini í rættlag og at flyta gjøldini á rætta stað, tvs, til Føroya Arbeiðarafelag og Kollafjarðar Arbeiðarafelag.

Seinasta royndin varð gjørd mánadagin, táið Føroya Arbeiðarafelag hevði fund við arbeiðsfólkið í Kollafirði.

Á tí fundinum varð staðfest, at kollfirðingarnir vilja framvegis verða limir í Kollafjarðar Arbeiðarafelag.

Í einum brævi, sum er sent Tórshavnar Býráð, verður gjørt vart við, at teir vilja samstundis eisini vera havnar Kommuna flytir øll limagjøld, eftirlønargjøld og gjøld til lívstryggingar til Kollafjarðar Arbeiðarafelag og til Føroya Arbeiðarafelag og ikki til onnur fakfeløg.

Fluttur við tvingsli

– Vit góðtaka ikki, at Tórshavnar Býráð hevur flutt uppi í lívstryggingini og eftirlønarskipanini hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Í brævinum krevja kollfirðingina tískil, at Tórshavnar Kommuna flytir øll limagjøld, eftirlønargjøld og gjøld til lívstryggingar til Kollafjarðar Arbeiðarafelag og til Føroya Arbeiðarafelag og ikki til onnur fakfeløg.

– Hann er limur hjá okkum, men vit fáa ikki lívstryggingarmøguleikan. Tí er tað óvist um hann kemur undir nakra trygging yvirhøvur.

Hans Madsen sigur, at fáast viðurskiftini ikki í rættlag nú, ivast hann ikki í, at tiltøk verða sett í verk ímóti Tórshavnar kommunu.

– Tað kann vera, at alt arbeiði, sum limir í Kollafjarðar Arbeiðarafelag gera fyri Tórshavnar Kommuna, verður niðurlagt.

–Sostatt verður alt, sum Tórshavnar Kommuna hevur við at gera í Kollafirði, lagt lamið.

Í fjør vórðu líknandi tiltøk sett í verk og tað førdi m.a. til, at skúlin stongdi so at ongin skúlagongd var, umframt at onnur arbeiði vórðu rakt.

Kollfirðingar vita ikki enn hvar teir flóta

-Ósemjan um Limirnar í Kollafjarðar Arbeiðarafelag er harnað seinastu dagarnar

ÓSEMJA
Áki Bertholdsen

Enn er ongin loysn fingin á ósemjuna um arbeiðsfólkið í kollafirði.

Tvørturímóti eru tekin til, at ósemjan harðnar í hvørjum.

Men samstundis er tað sumt, sum bendir á, at ein avgerð fer at fella í málinum nakað skjótt.

Í hvussu so er, hevur bæði Føroya Arbeiðarafelag og Kollafjarðar Arbeiðarafelag mist tolið.

Bæði Hans Madsen og Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag eru samd um, at tað skal vera nú, at skil aftur fæst á viðurskiftini.

Tað, sum ósemja er um, er, hvørjum fakfelag arbeiðsfólkini í Kollafirði skulu vera limir í.

Tey hava verið limir í Kollafjarðar Arbeiðarafelag, og sostatt eisini í Føroya Arbeiðarafelag, í nógv ár. Men nú Kollafjørður kom uppí Tórshavnar Kommunu, ger Havnar Arbeiðsmannafelag vart við seg og heldur, at arbeiðsmenninir í Kollafirði eiga at vera limir havnar Arbeiðsmannafelag.

Somuleiðis er eisini ósemja um dagrøktararnar í Kollafirði.

Føroya Arbeiðarafelagi gjørdi í fjør sáttmála við Tórshavnar Kommunu um dagrøktararnar í Kollafirði. Men tann sáttmálin var bara galdandi til 31. desember í fjør, tí tá kom Kollafjørður upp í Havnina og dagrøktarar í Tórshavnar Kommunu eru í Starvsmannafelagnum. 1. januar skuldi tað sostatt vera Starvsmannafelagið, sum eisini yvirtók samráðingarrættin fyri teir dagrøktarar hjá Tórshavnar Kommunu, sum arbeiða í Kollafirði.

–Tórshavnar Kommuna fær hesa vikuna til at fáa viðurskiftini í rættlag, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag

Flyta ikki gjøldini

Síðani tá hevur ósemja verið um verkafólkið í Kollafirði og hendan ósemjan er bara harðnað, tað sum farið er av árinum.

Hans Madsen sigur, at síðani samanleggingina á nýggjárinum, er Tórshavnar Kommuna blivin arbeiðsgevari hjá nógvum limum í Kollafjarðar Arbeiðarafelag

Men ein avleiðing av ósemjuni er, at Tórshavnar Kommuna flytir ikki Kollafjarðar Arbeiðarafelag limagjaldið fyri teir limirnar í Kollafjarðar Arbeiðarafelag og sum arbeiða hjá kommununi.

Heldur ikki hevur Býráðið flutt gjøldini til lívstrygging og eftirlønar til Føroya Arbeiðarafelag, men til Starvsmannafelagið og Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hann ger eisini vart við, at síðani kommununnar vórðu lagdar saman er ongin nýggjur sáttmáli gjørdur fyri dagrøktararnar í Kollafirði.

– Og so leingi, nýggjur sáttmáli ikki er gjørdur, er tann gamli galdandi.

Hans Madsen sigur, at tað er beinleiðis ólógligt at Tórshavnar Kommuna flytir gjøldni til onnur feløg enn tað, sum fólkið er limur í, sigur Hans Madsen.

– Hetta er at leggja seg út í viðurskifti, sum Tórshavnar Kommuna onki hevur við at gera.

Ingeborg Vinther leggur afturat, at kommunan hevur ongan rætt til at flyta limir í onnur feløg ímóti teirra vilja.

Tey bæði fakfelagsfólkini eru tí púra samd um, at støðan er ótolandi, og sum tað sæst á grein aðrastaðni í blaðnum, krevja tey eina endaliga loysn á málinum fyrsta dagin.

Klekja hugskot til kapital

Ljós hugskot hjá klókum høvdum innan kunningartøkni skulu hava góð kor at fremjast í verki. Tí setir landsstýrismaðurin í vinnumálum á stovn ein klekingardepil, ið skal stuðla gongdini frá hugskoti til fíggjarligan vinning

KLEKINGARDEPIL
John Johannessen

Bjarni Djurholm setir nú á stovn KT-klekingardepil, ið skal geva klókum høvdum eitt spark í dintilin at menna hugskot til kapital

Mynd: John Johannessen

Dugnaligir føroyingar innan kunningartøkni skulu hava góðar sømdir at gera hugskot til veruleika.

Hetta heldur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum. Og tí hevur landsstýrismaðurin gjørt av at stovna ein KT-klekingardepil at klekja hugskot til veruligar verkætlanir.

Í gongd beinan vegin

KT-klekingardepilin skal í gongd sum skjótast. Uppgávurnar hjá honum verða »at skapa serligar karmar fyri menning av nýggjum KT-fyritøkum, við at geva teimum virkisligar karmar og lætta teimum um atgongdina til fígging og ráðgeving í byrjunartíðini«, sum tað stendur í reglugerðini fyri depilin.

Hetta merkir sambært Bjarna Djurholm ikki, at KT fólk nú fáa eina slangu inn í landskassan. Í staðin fáa tey eina hjálpandi hon til at fremja í verki hugskot, sum kunnu vera samfelagnum at gagni. Og hendan »hjálpandi hondin« verður ikki beinleiðis fíggjarligur stuðul, men karmar at arbeiða undir, holl ráðgeving og hjálp at leita sær fíggjarligan stuðul frá privatum og grunnum.

Í hesum sambandi vísir landsstýrismaðurin á, at klekingardepilin til dømis veitir slíkar karmar, sum skrivstovu og telduútgerð til tey, sum fara í gongd við eina verkætlan við stuðuli frá klekingardeplinum. Harafturat kemur so ráðgevingin og fíggjarligi stuðulin.

– Vit kunnu siga, at endamálið við KT-klekingardeplinum er at geva ungum klókum høvdum eitt spark í dintilin til at handilsgera nýgg hugskot. Tað skal vera møguligt at granska fyri at vinna pening og ikki at granska fyri søkina hjá granskingini, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Virkar sum slúsa

Júst tí, at KT-klekingardepilin skal virka sum eitt spark í dintilin, er ikki meiningin, at tey, sum koma undir veingjabreiðið hjá deplinum skulu verða verandi har.

Meiningin er, at góðu hugskotini skulu mennast og klekjast í klekingardeplinum, soleiðis at tey enda sum søluvøra til útflutnings. Og tá kann klekingardepilin møguliga krevja at fáa ein bita burtur av vinninginum ella lut í partabrøvunum, sum takk fyri hjálpina.

KT-klekingardepilin hevur enn einans 800.000 krónur í kassanum. Tí er ætlanin, at Framtaksgrunnurin, møguliga í nýggjum líki, skal stuðla áhugaverdum KT-ætlanum fíggjarliga.

– Tað skal ikki vera meiningin, at tú til dømis skalt brúka allan tín arv, fyri at hava møguleikan at menna eitt hugskot til nakað ítøkiligt, sigur Bjarni Djurholm.

Partur av hugskotinum um nýggja KT-klekingardepilin kemur frá ísraelsferðini hjá Bjarna Djurholm fyri stuttum.

Fugloy og Svínoy knýttar saman

Í mei verða Fugloyggin og Svínoyggin knittar saman í hátøkniligt samskiftisnet.

Tað er sokallaða Svínoyarætlanin, ið verður víðkað, soleiðis at KT-netið, sum eina tíð hevur verið í Svínoynni nú verður víðkað, so tað eisini fevnir um Fugloynna.

Hetta merkir, at íbúgvar í Svínoynni og Fugloynni kunnu samskifta við nógvari ferð á internetinum og á innanhýsis neti.

Útsøla við avsláttri heilt upp til 90 %

Til Veiðimannin
Patrónir cal. 20
Húkar
Beitir
Við nógvum avsláttri

byrjar mánadagin
30. apríl kl 8.00
(í morgin 28. apríl er stongt)

Stampar v/loki
40-60-80 ltr.
-30%

Tatay havaútgerð
Alt skal út
Við nógvum avsláttri
Hvítt sanitet
Baðikar við skamfíli
við nógvum avsláttri

WC-kumma hvít
við nógvum avsláttri
Brúsiforhang
við nógvum avsláttri

Baðirúmsútgerð
við avsláttri upp til
50%

Blandings battarí
til brúsu og kar av merkinum ORA
-40%

Hafa Old vision

Hafa Victoria Vaskiskáp u/vask
Eisini væl egna til gangsmøbil
Fyrr 4.412,50
Nú 3.530,-

Hafa Edward Baðirúmsskáp
Fyrr 1.862,50
Nú 1.490,-

Spegl Victoria
530x185 cm
Fyrr 637,50
Nú 478,-

Hafa Henrik Baðirúmsskáp
Fyrr 1.862,50
Nú 1.490,-

Vaskiskáp Elisabeth
v/ vask og 8-kanta vask
Fyrr 4.950,-
Nú 3.712,50

Hafa Baðirúms møblar

Hafa Soft Vision
v/ Hurðasniði Avanti
og hafa Philip yvirskápi
Breidd 1400 cm
Fyrr 15.931,50
Nú 11.948,50

Aðrir baðirúmsmøblar

Hafa Section
Breidd 120 cm
Fyrr 9.587,50
Nú 7.190,50

Hafa New Vision
v/ Hurðasniði Nuova
og hafa Philip yvirskápi
Fyrr 13.558,75
Nú 10.847,-

Annars nógv onnur góð tilboð

umfatar allar útsøluvørur:
einans kontant, vørurnar vera ikki avlagdar, umbýttar ella afturtiknar

Lita sanitet IFØ
Hondvask
Soylur
Bide
Brúsubakkar
Alt skal út
Avsláttur upp til 90%

Scan Style stálvask
rustfritt
avsláttur upp til
70%

Radiatorar
við skaða
við nógvum
avsláttri

Handklæðisturkari
úr merkinum Oras
sera biligur
Fyrr 2.825,-
Nú einans 500,-

Jama Ketlar
(við skaða)
v/avsláttri

Svend Krosstein
Falkavegur - tlf. 31 46 00
VHS
AMERISK VATN HITAVERK SANITET